NORÐOYA SPARIKASSI

# HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2021

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Fuglafirði:
Í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tel. 475000

Deildin í Tórshavn:
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. 475000
Fax 476015

# Innihaldsyvirlit

| | | |
|---|---|---|
| LEIÐSLUÁTEKNING | s. | 3 |
| HÁLVÁRSFRÁGREIÐING 2021 | s. | 4 |
| RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2021 | s. | 7 |
| FÍGGJARJAVNI 30. JUNI 2021 | s. | 8 |
| ÚTGREINING AV EGINPENINGI | s. | 9 |
| SOLVENSUPPGERÐ | s. | 10 |
| LYKLA- OG HØVUÐSTØL | s. | 11 |
| NOTUR | s. | 12 |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið hálvársfrásøgnina fyri 1. hálvár 2021 fyri Norðoya Sparikassa. Hálvársfrásøgnin er greidd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi, herundir roknskaparkunngerð frá Fíggjareftirlitinum um fíggjarligar frásagnir hjá kredittstovnum v.m.

Tað er okkara fatan, at hálvársfrásøgnin gevur eina rættvísa mynd av sparikassans ognum, skyldum og fíggjarjavna pr. 30. juni og úrslitinum fyri 1. hálvár 2021.

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað.

Klaksvík, hin 26. august 2021.

Stjórn

Marner Mortensen

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| Símun Absalonsen<br>formaður | Karl Heri Joensen<br>næstformaður | Frimodt Rasmussen |
| Súsanna Olsen | Rúni Heinesen | Annika Sølvará |
| Guðrið  Lava Olsen | Tummas Martin Sólsker | Jørmund Foldbo |

# Hálvársfrágreiðing 2021

## Fyrra hálvár í stuttum

- Avlop eftir skatt 10,4 mió. kr.
- Renting av eginognini eftir skatt 3,8 %
- Útlánini øktust 1,0 %
- Innlánini lækkaðu 0,6 %
- Ábyrgdarfæið øktist 10,8 %
- Útlánsprosentið 83 %
- Lyklatal fyri gjaldføri (LCR) 274 %
- Kjarnukapitalprosentið 21,1 %
- Solvensurin 23,1 %
- Solvenstørvurin 10,3 %

## Virksemi

Sparikassans virksemi er at veita fíggjarligar tænastur til privat og vinnurekandi viðskiftafólk og almennar stovnar um alt landið. Sparikassin ynskir at veita viðskiftafólkum sínum eitt fjølbroytt úrval av fíggjarligum tænastum og eisini eina holla og professionella ráðgeving.

## Gongdin fyrra hálvár 2021

Úrslitið eftir skatt var eitt avlop upp á 10,4 mió. kr. samanborið við 6,0 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør. Hækkingin stavar í høvuðsheitum frá hægri rentu- og kostnaðarinntøkum og lægri niðurskrivingum upp á útlán. Fyrra hálvár hevur sparikassin framt netto afturføringar av niðurskrivingum upp á 0,8 mió. kr. Sama tíðarskeið í fjør vóru niðurskrivingarnar 1,8 mió. kr., tá sparikassin avsetti pening ímóti langtíðarárin av COVID-19. Eginognin rentaði við 3,8 % fyrra hálvár og er nú 281 mió. kr.

Um sæð verður burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum av útlánum, hevði sparikassin eitt avlop av vanligum rakstri fyrra hálvár upp á 10,6 mió. kr. móti 9,0 mió. kr. sama tíðarskeið árið fyri. Hetta er ein hækking í vanliga rakstrinum upp á 1,6 mió. kr., ið stavar frá hægri rentu- og kostnaðarinntøkum. Inntøkurnar hækkaðu við 1,9 mió. kr., meðan útreiðslurnar hækkaðu við 0,3 mió. kr.

Fyrra hálvár 2021 øktust útlánini við 1,0 % og innlánini lækkaðu við 0,6 %. Rentustøðið er framvegis sera lágt og leggur hetta trýst á rentuinntøkurnar av útlánum og lánsbrøvum, men við tillaging av rentuútreiðslum eru netto rentuinntøkurnar øktar við 1,3 mió. kr. í mun til sama tíðarskeið í fjør. Ein týðandi partur av tillagingini er, at sparikassin hevur ásett negativa rentu fyri ávís innlán. Hetta fyri partvíst at viga upp ímóti teimum útreiðslum, sum sparikassin hevur av at seta pening í Tjóðbankan ella í styttri lánsbrøv, har rentan í fleiri ár hevur verið negativ, og fyri at betra um inntøkugrundarlag sparikassans. Harafturat eru netto kostnaðar- og provisjónsinntøkur hækkaðar við 0,7 mió. kr. í mun til sama tíðarskeið í fjør.

Á umboðsráðsfundinum í apríl í ár samtykti umboðsráðið at renta ábyrgdarpeningin fyri 2020 við 3 prosentum, hóast tað í rentupolitikkinum varð miðað ímóti 4 prosentum. Lækkingin var grundað á tilmæli frá Fíggjareftirlitinum, sum vegna búskaparligu óvissuna við COVID-19 mælti peningastovnum til varsemi í sambandi við útgjald av vinningsbýti. Tilmælið var eisini galdandi fyri rentu av ábyrgdarpeningi, sum verður sammett við vinningsbýti hjá partafeløgum. Sparikassans politikkur fyri 2021 er, at árliga rentan á ábyrgdarpeningi verður 4 prosent. Sparikassin merkir stóran áhuga fyri at tekna ábyrgdarpening, og fyrra hálvár er ábyrgdarpeningurin hækkaður við 3,1 mió. kr., ið svarar til eina øking upp á 10,8 %.

Gongdin fyrra hálvár hevur sum heild verið í samsvari við metingar sparikassans, og samanumtikið er sparikassin nøgdur við gongdina.

## ROKNSKAPARFRÁGREIÐING

### Netto rentu- og kostnaðarinntøkur

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar vóru 39,5 mió. kr. í mun til 37,6 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør, sum er ein øking upp á 2 mió. kr. Kappingarstøðan og lága rentustøðið leggja trýst á rentuinntøkurnar av útlánum og lánsbrøvum, men vegna tillaging av innlánsrentum eru netto rentuinntøkurnar øktar við 1,3 mió. kr. Kostnaðar- og provisjónsinntøkur eru hækkaðar við 0,7 mió. kr. í mun til fyrra hálvár 2020.

### Virðisjavnan

Virðisjavnan vísir eitt hall upp á 1 mió. kr. sammett við hall upp á 1,2 mió. kr. sama tíðarskeið undanfarna ár. Tað er ein hækking upp á 0,2 mió. kr. Virðisjavnan av lánsbrøvum vísti eitt hall upp á 1,6 mió. kr., meðan virðisjavnan av partabrøvum var eitt avlop upp á 0,4 mió. kr., og virðisjavnan av gjaldoyra var eitt avlop á 0,1 mió. kr. Sparikassin eigur bert partabrøv í feløgum, sum sparikassin samstarvar við.

### Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting

Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting lækkaðu úr 27,7 mió. kr. niður í 27,4 mió. kr., ið er ein lækking upp á 0,3 mió. kr. Útreiðslur til lønir og sosialar veitingar lækkaðu við 0,4 mió. kr., meðan útreiðslur til fyrisiting hækkaðu við 0,1 mió. kr. Samlaða talið av ársverkum fyrra hálvár í ár var 43,4 sammett við 44,8 sama tíðarskeið í fjør.

### Niðurskrivingar

Góða gongdin í føroyska búskapinum sæst aftur hjá kundum sparikassans, sum eru væl fyri til at halda sínar fíggjarligu skyldir. Sparikassin hevur fyrra hálvár framt netto afturføringar av niðurskrivingum upp á 0,8 mió. kr. Fyrra hálvár í fjør vóru niðurskrivingarnar 1,8 mió. kr., tá sparikassin avsetti pening í sambandi við møgulig langtíðarárin av COVID-19. Hóast sparikassin ikki hevur staðfest beinleiðis tap av COVID-19, so er samlaða avsetingin mótvegis COVID-19 upp á 8 mió. kr. óbroytt fyrra hálvár 2021.

## FÍGGJARJAVNI

Fíggjarjavnin 1. hálvár 2021 var 2.790 mió. kr. samanborið við 2.783 mió. kr. við ársbyrjan. Hetta er ein øking upp á 7 mió. kr., sum svarar til 0,2 %.

Útlánini øktust úr 1.990 mió. kr. við ársbyrjan upp í 2.011 mió. kr. 1. hálvár 2021, sum svarar til ein vøkstur upp á 21 mió. kr. ella 1,0 %. Innlánini lækkaðu úr 2.469 mió. kr. við ársbyrjan niður í 2.453 mió. kr. 1. hálvár 2021, sum er ein lækking upp á 16 mió. kr. ella 0,6 %.

### Gjaldføri

Gjaldførið hjá sparikassanum er gott. Lyklatalið fyri gjaldføri – LCR – var uppgjørt til 274 % fyrra hálvár 2021. Lógin ásetur markvirðið til í minsta lagi 100 %. Eftirlitsdiamanturin hjá Fíggjareftirlitinum tekur útgangsstøði í framskriving av LCR í 3 mánaðir og ásetur markvirðið til minst 100 %. Sparikassin hevur uppgjørt lyklatalið sambært eftirlitsdiamantinum til 306 % fyrra hálvár 2021.

### Solvensur og solvenstørvur

Solvensurin hjá sparikassanum er góður. Fyrra hálvár í ár var solvensurin 23,1 % í mun til 21,1 % somu tíð í fjør. Kapitalkrøvini verða alsamt herd komandi árini, og sparikassin leggur stóran dent á at bjálva seg enn betur til komandi krøvini. Mett verður, at sparikassin við verandi virksemi er væl fyri í mun til komandi kapitalkrøv.

Individuelli solvenstørvurin var uppgjørdur til 10,3 % pr. 1. hálvár 2021 í mun til 10,9 % somu tíð í fjør.

### Eftirlitsdiamanturin

Fíggjareftirlitið setti í 2012 í gildi ein sokallaðan eftirlitsdiamant. Har verða nevnd fimm ávaringartekin, sum kunnu geva ábendingar um, at ein peningastovnur hevur ov høgan váða. Niðanfyri er stutt frágreiðing um, hvussu váði sparikassans er í mun til hesi ávaringartekin.

Samanumtikið er sparikassin væl innanfyri hesi fimm ávaringartekin:

- **Stórir kundar** (20 teir størstu kundarnir tilsamans skulu vera minni enn 175 % av veruliga kjarnukapitalinum): 20 teir størstu kundarnir tilsamans pr. 30. juni 2021 eru uppgjørdir til 117 % av veruliga kjarnukapitalinum.
- **Útlánsvøkstur** (skal vera minni enn 20 % um árið): Sparikassin hevði fyrra hálvár 2021 ein útlánsvøkstur upp á 1,0 %.
- **Útlán og ábyrgdir til fastognir** (skulu vera minni enn 25 % av útlánum og ábyrgdum tilsamans): Pr. 30. juni 2021 vóru útlán og ábyrgdir sparikassans til fastognir 8,4 % av samlaðu útlánunum og ábyrgdunum.
- **Fíggingarlutfall** (útlán/arbeiðandi kapitalur minus lánsbrøv við restáramáli undir 1 ár, skal vera minni enn 1): Sparikassin hevur uppgjørt fíggingarlutfallið til 0,7 pr. 30. juni 2021.
- **Lyklatal fyri gjaldføri** (skal vera omanfyri 100 %): Sparikassin hevur pr. 30. juni 2021 uppgjørt lyklatalið til 306 %.

## Váðar og váðastýring

Ongar broytingar eru í váða og váðastýring sparikassans. Víst verður til frágreiðingina í ársfrásøgnini fyri 2020.

## Hendingar eftir roknskapartíðarskeiðið

Eftir at roknskapartíðarskeiðið endaði 30. juni 2021 hava ongar hendingar verið, sum hava týðandi ávirkan á hálvársfrásøgnina.

## Óvissur í sambandi við virðisáseting

Tær mest týðandi óvissurnar í sambandi við virðisáseting eru knýttar at virðisáseting av ognum og niðurskrivingum av útlánum og áogn. Leiðslan metir, at óvissurnar eru á einum støði, sum eru nøktandi í mun til hálvársfrásøgnina.

## Nýttur roknskaparháttur

Sum upplýst í ársfrásøgnini fyri 2020 er nýttur roknskaparháttur broyttur í sambandi við leasing (IFRS 16) frá 1. januar 2021.

Broytingin hevur við sær, at sparikassin við ársbyrjan hevur innroknað eina leasingogn upp á 3,7 mió. kr. í sambandi við fastogn til egna nýtslu. Somuleiðis er innroknað ein leasingskylda upp á 3,7 mió. kr., og harvið er eingin broyting í eginognini.

Burtursæð frá broytingini í sambandi við leasing hevur sparikassin ongar broytingar gjørt í nýttum roknskaparhátti 1. hálvár 2021. Víst verður til ársfrásøgnina fyri 2020.

## Meting fyri 2021

Fyrra hálvár 2021 var avlopið áðrenn skatt 10,4 mió. kr. Seinna hálvár væntast avlopið av vanligum rakstri at verða á sama støði sum fyrra hálvár, meðan stór óvissa er knýtt at virðisjavnan og niðurskrivingum.

Í ársfrásøgnini fyri 2020 varð mett, at úrslitið áðrenn skatt fyri 2021 fór at verða millum 15-18 mió. kr. Sparikassin er framvegis av tí fatan, at úrslitið áðrenn skatt fyri 2021 verður millum 15-18 mió. kr.

# Rakstrarroknskapur 1. hálvár 2021

| Nota | | 1H 2021<br>1.000 DKK | 1H 2020<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | 35.547 | 34.457 |
| 2 | Rentuútreiðslur | 1.223 | 1.422 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **34.324** | **33.036** |
| | | | |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 0 | 0 |
| 3 | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 5.586 | 4.887 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 371 | 369 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **39.539** | **37.554** |
| | | | |
| 4 | Virðisjavnan av virðisbrøvum, gjaldoyra o.ø. | -996 | -1.161 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 18 | 61 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 27.427 | 27.684 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 1.375 | 750 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | 140 | 167 |
| 6 | Av- og niðurskrivingar upp á skuldarar, netto | -797 | 1.843 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **10.415** | **6.011** |
| | | | |
| | Skattur | 0 | 0 |
| | **Hálvársúrslit** | **10.415** | **6.011** |

# Fíggjarjavni 30. juni 2021

| Nota | | 1H 2021<br>1.000 DKK | 1H 2020<br>1.000 DKK | 2020<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 154.576 | 220.849 | 199.434 |
| | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 29.483 | 32.587 | 26.853 |
| | Útlán til amortiserað kostvirði | 2.010.765 | 1.958.580 | 1.990.121 |
| 7 | Lánsbrøv til dagsvirði | 541.400 | 562.382 | 516.831 |
| | Partabrøv o.a. | 14.682 | 13.827 | 14.138 |
| | Fastognir tilsamans | 14.966 | 11.771 | 11.644 |
| | Íløguognir | 0 | 0 | 0 |
| | Fastognir til egna nýtslu | 11.623 | 11.771 | 11.644 |
| | Fastognir (leasing) | 3.344 | 0 | 0 |
| | Aðrar materiellar ognir | 5.011 | 6.105 | 5.393 |
| | Útsett skattaáogn | 7.200 | 7.200 | 7.200 |
| | Yvirtiknar ognir | 332 | 7.287 | 606 |
| | Aðrar ognir | 11.495 | 2.567 | 10.995 |
| | **Ogn tilsamans** | **2.789.911** | **2.823.155** | **2.783.214** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | | |
| | **Skuld** | | | |
| | Skuld til peningastovnar og tjóðbankar | 367 | 595 | 269 |
| | Innlán | 2.453.060 | 2.517.719 | 2.469.104 |
| | Onnur skuld | 28.184 | 20.479 | 18.104 |
| | Tíðaravmarkingar | 359 | 477 | 510 |
| | **Skuld tilsamans** | **2.481.970** | **2.539.270** | **2.487.987** |
| | | | | |
| | **Avsetingar** | | | |
| | Avsetingar til eftirløn o.a. | 1.722 | 1.806 | 1.722 |
| | Avsetingar til tap upp á ábyrgdir | 136 | 484 | 109 |
| | Aðrar avsetingar | 10 | 264 | 28 |
| | **Avsetingar tilsamans** | **1.868** | **2.555** | **1.859** |
| | | | | |
| | **Eftirstillað kapitalinnskot** | **25.500** | **25.500** | **25.500** |
| | | | | |
| | **Eginpeningur** | | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 31.620 | 26.028 | 28.547 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 238.537 | 223.776 | 223.776 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 10.415 | 6.011 | 14.746 |
| | Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | 785 |
| | Regulering av rentu av ábyrgdarpeningi | 2 | 15 | 15 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **280.573** | **255.830** | **267.869** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.789.911** | **2.823.155** | **2.783.214** |
| | | | | |
| 8 | Aðrar skyldur | | | |

# Útgreining av eginpeningi

| | 1H 2021<br>1.000 DKK | 1H 2020<br>1.000 DKK | 2020<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| **Kapitalflytingar** | | | |
| Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 28.547 | 25.236 | 25.236 |
| Tilgongd í árinum | 3.421 | 1.933 | 4.506 |
| Frágongd í árinum | -348 | -1.141 | -1.195 |
| **Ábyrgdarpeningur tilsamans** | **31.620** | **26.028** | **28.547** |
| | | | |
| Flutt avlop við ársbyrjan | 238.537 | 223.776 | 223.776 |
| Flutt úrslit | 10.415 | 6.011 | 15.531 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -785 |
| Regulering renta av ábyrgdarpeningi undanfarið ár | 2 | 15 | 15 |
| **Flutt avlop tilsamans** | **248.953** | **229.802** | **238.537** |
| | | | |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | 785 |
| | | | |
| Eginpeningur tilsamans | 280.573 | 255.830 | 267.869 |

# Solvensuppgerð

| | 1H 2021<br>1.000 DKK | 1H 2020<br>1.000 DKK | 2020<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| Eginpeningur | 280.573 | 255.830 | 267.869 |
| Hálvársúrslit | -10.415 | -6.011 | 0 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -785 |
| Varislig meting av dagsvirði | -557 | -584 | -532 |
| Aktiverað skattaaktiv | -7.200 | -7.200 | -7.200 |
| Heimild at útgjalda ábyrgdarpening | -1.000 | -1.000 | -1.000 |
| **Kjarnukapitalur aftaná frádrøg tilsamans** | **261.402** | **241.035** | **258.352** |
| | | | |
| Ábyrgdarlán | 25.500 | 25.500 | 25.500 |
| **Kapitalgrundarlag aftaná frádrøg tilsamans** | **286.902** | **266.535** | **283.852** |
| | | | |
| Vektað tøl tilsamans | 1.239.770 | 1.261.845 | 1.254.276 |
| Solvensprosent | 23,1 | 21,1 | 22,6 |
| Kjarnukapitalprosent | 21,1 | 19,1 | 20,6 |
| | | | |
| **Uppgerð av individuellum solvenstørvi** | | | |
| Kredittváði | 16.272 | 17.380 | 17.034 |
| Marknaðarváði | 5.603 | 6.989 | 5.263 |
| Operationellur váði | 6.199 | 6.309 | 6.271 |
| Annar váði | 286 | 6.361 | 0 |
| Lógarkrøv | 99.182 | 100.948 | 100.342 |
| **Individuellur solvenstørvur tilsamans** | **127.542** | **137.987** | **128.910** |
| | | | |
| Solvenstørvur (%) | 10,3 | 10,9 | 10,3 |

# Lykla- og høvuðstøl

| Lyklatøl | 1H 2021 | 1H 2020 | 1H 2019 | 1H 2018 | 1H 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 23,1 | 21,1 | 20,4 | 19,3 | 18,3 |
| Kjarnukapitalprosent | 21,1 | 19,1 | 18,5 | 17,3 | 16,2 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 3,8 | 2,4 | 3,3 | 2,2 | 3,8 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | 3,8 | 2,4 | 3,3 | 2,2 | 3,8 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,4 | 1,2 | 1,3 | 1,2 | 1,3 |
| Rentuváði | 1,7 | 3,0 | 1,7 | 1,9 | 2,8 |
| Gjaldoyrastøða | 1,5 | 0,9 | 0,9 | 0,6 | 0,4 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán | 83,1 | 79,2 | 84,3 | 84,3 | 80,9 |
| Lyklatal fyri gjaldføri (LCR) | 273,7 | 275,6 | 245,9 | 273,0 | 317,1 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til kjarnukapital | 117,3 | 126,9 | 128,0 | 142,5 | - |
| Akkumulerað niðurskrivingarprosent | 1,3 | 1,7 | 1,8 | 2,0 | 1,8 |
| Taps- og niðurskrivingarprosent í hálvárinum | 0,0 | 0,1 | -0,1 | 0,1 | 0,0 |
| Útlánsvøkstur í hálvárinum | 1,0 | 0,6 | 3,0 | 3,9 | 2,4 |
| Útlán í mun til eginpening | 7,2 | 7,7 | 7,9 | 8,2 | 8,0 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 1H 2021 | 1H 2020 | 1H 2019 | 1H 2018 | 1H 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | |
| Netto rentuinntøkur | 34.324 | 33.036 | 30.976 | 30.891 | 29.604 |
| Netto kostnaðarinntøkur | 5.215 | 4.518 | 5.467 | 4.464 | 3.712 |
| Aðrar inntøkur | 18 | 61 | 15 | 634 | 430 |
| **Inntøkur íalt** | **39.557** | **37.615** | **36.458** | **35.989** | **33.746** |
| | | | | | |
| **Útreiðslur** | | | | | |
| Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 27.427 | 27.684 | 30.332 | 26.691 | 25.835 |
| Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 1.375 | 750 | 720 | 3.395 | 720 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 140 | 167 | 276 | 84 | 13 |
| **Útreiðslur íalt** | **28.942** | **28.601** | **31.328** | **30.170** | **26.568** |
| | | | | | |
| **Grundrakstur** | **10.615** | **9.014** | **5.130** | **5.819** | **7.178** |
| | | | | | |
| Virðisjavnan | -996 | -1.161 | 1.197 | -255 | 1.167 |
| Av- og niðurskrivingar, skuldarar | -797 | 1.843 | -1.610 | 539 | 282 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **10.415** | **6.011** | **7.937** | **5.026** | **8.063** |
| | | | | | |
| Skattur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Úrslit** | **10.415** | **6.011** | **7.937** | **5.026** | **8.063** |
| | | | | | |
| Útreiðsluprosent | 73,2 | 76,0 | 85,9 | 83,8 | 78,7 |
| | | | | | |
| Fíggjarjavni | | | | | |
| Útlán | 2.010.765 | 1.958.580 | 1.943.065 | 1.875.321 | 1.735.089 |
| Virðisbrøv | 556.082 | 576.209 | 519.426 | 463.831 | 524.199 |
| Innlán | 2.453.060 | 2.517.719 | 2.350.170 | 2.271.993 | 2.186.545 |
| Javni | 2.789.911 | 2.823.155 | 2.633.436 | 2.543.671 | 2.451.381 |
| Eginpeningur | 280.573 | 255.830 | 246.726 | 228.237 | 217.788 |
| Ábyrgdir | 113.301 | 107.024 | 85.616 | 73.494 | 59.313 |

# Notur

| Nota | | 1H 2021<br>1.000 DKK | 1H 2020<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 18 | 0 |
| | Útlán | 31.137 | 31.788 |
| | Negativ renta av innlánum | 3.891 | 1.796 |
| | Lánsbrøv | 696 | 1.089 |
| | Rentusáttmálar | -195 | -215 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **35.547** | **34.457** |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 0 | 0 |
| | Negativ renta av innistandandi hjá peningastovnum | 472 | 588 |
| | Negativ renta av lánsbrøvum | 104 | 169 |
| | Innlán | 78 | 149 |
| | Eftirstillað kapitalinnskot | 513 | 516 |
| | Aðrar rentuútreiðslur | 56 | 0 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **1.223** | **1.422** |
| 3 | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur** | | |
| | Virðisbrøv og goymsla | 191 | 115 |
| | Gjaldstænastur | 1.636 | 1.264 |
| | Lánisakskostnaður | 860 | 1.050 |
| | Provisión av ábyrgdum | 1.154 | 1.105 |
| | Aðrar kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 1.745 | 1.354 |
| | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur tilsamans** | **5.586** | **4.887** |
| 4 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | -1.555 | -1.533 |
| | Partabrøv | 418 | 292 |
| | Íløguognir | 0 | 0 |
| | Gjaldoyra | 141 | 80 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **-996** | **-1.161** |
| 5 | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting** | | |
| | **Løn og samsýning til umboðsráð, nevnd og stjórn** | | |
| | Stjórn | 1.174 | 1.151 |
| | Nevnd | 541 | 536 |
| | Umboðsráð | 80 | 85 |
| | **Tilsamans** | **1.795** | **1.772** |
| | **Starvsfólkaútreiðslur** | | |
| | Løn | 11.067 | 11.496 |
| | Eftirløn | 1.958 | 1.944 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 2.063 | 2.064 |
| | **Tilsamans** | **15.088** | **15.504** |
| | Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 10.543 | 10.408 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting tilsamans** | **27.427** | **27.684** |
| | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk | 43,4 | 44,8 |

# Notur

| Nota | | 1H 2021<br>1.000 DKK | 1H 2020<br>1.000 DKK | 2020<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m.** | | | |
| | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m.** | | | |
| | **Stig 1:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 1.278 | 2.108 | 2.108 |
| | Niðurskrivað í árinum (netto) | -110 | -723 | -831 |
| | Niðurskrivingar ultimo | 1.168 | 1.385 | 1.278 |
| | **Stig 2:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 9.113 | 2.082 | 2.082 |
| | Niðurskrivað í árinum (netto) | -232 | 2.452 | 7.031 |
| | Niðurskrivingar ultimo | 8.881 | 4.534 | 9.113 |
| | **Stig 3:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 17.658 | 29.132 | 29.132 |
| | Niðurskrivað í árinum | 2.958 | 4.971 | 8.052 |
| | Afturførdar niðurskrivingar í árinum | -2.710 | -4.030 | -9.540 |
| | Avskrivað, áður niðurskrivað | -120 | -292 | -9.986 |
| | Niðurskrivingar ultimo | 17.785 | 29.780 | 17.658 |
| | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m. tilsamans** | **27.834** | **35.699** | **28.049** |
| | **Burturleggingar upp á ábyrgdir v.m.** | | | |
| | **Stig 1:** | | | |
| | Burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 104 | 122 | 122 |
| | Burturleggingar í árinum (netto) | -23 | 28 | -18 |
| | Burturleggingar ultimo | 81 | 150 | 104 |
| | **Stig 2:** | | | |
| | Burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 5 | 0 | 0 |
| | Burturleggingar í árinum (netto) | 50 | 334 | 5 |
| | Burturleggingar ultimo | 56 | 334 | 5 |
| | **Burturleggingar upp á ábyrgdir v.m. tilsamans** | **136** | **484** | **109** |
| | **Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar v.m.** | | | |
| | **Stig 1:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar v.m. við ársbyrjan | 160 | 166 | 166 |
| | Niðurskrivað í árinum (netto) | -16 | 19 | -6 |
| | Niðurskrivingar ultimo | 144 | 186 | 160 |
| | **Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar v.m. tilsamans** | **144** | **186** | **160** |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar tilsamans** | **28.115** | **36.369** | **28.318** |

# Notur

| Nota | | 1H 2021<br>1.000 DKK | 1H 2020<br>1.000 DKK | 2020<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m. (framhald)** | | | |
| | Samanseting til rakstrarroknskapin | | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán netto | -94 | 2.669 | 4.713 |
| | Burturleggingar upp á ábyrgdir netto | 27 | 363 | -13 |
| | Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar netto | -16 | 19 | -6 |
| | Staðfest tap í árinum, ið ikki áður eru niðurskrivaði | 30 | 133 | 256 |
| | Inngoldið til áður avskrivaði krøv | -329 | -177 | -271 |
| | Niðurskrivingar av yvirtiknum ognum | -59 | -50 | -41 |
| | Renta av niðurskrivingum | -355 | -1.115 | -1.520 |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar til rakstrarroknskapin tilsamans** | **-797** | **1.843** | **3.119** |
| 7 | **Lánsbrøv til dagsvirði** | | | |
| | Statslánsbrøv | 143.805 | 199.412 | 199.729 |
| | Realkredittlánsbrøv | 397.595 | 352.950 | 307.096 |
| | Onnur lánsbrøv | 0 | 10.020 | 10.006 |
| | **Lánsbrøv til dagsvirði tilsamans** | **541.400** | **562.382** | **516.831** |
| 8 | **Aðrar skyldur uttan fyri javnan** | | | |
| | Fíggjarábyrgdir | 16.899 | 8.564 | 9.571 |
| | Tapsábyrgdir | 33.590 | 22.033 | 29.287 |
| | Aðrar skyldir | 62.812 | 76.427 | 83.310 |
| | **Aðrar skyldir uttan fyri javnan tilsamans** | **113.301** | **107.024** | **122.168** |

www.ns.fo